# Fylgiskjal I: Neyvari lýsing av tænastum

## 1 Net og linjur

Netsambandið millum *stovnin* og rakstrardepilin verður bronglað. Samskiftið, sum fer fram umvegis internetið, verður sum meginregla ikki bronglað.

Linjur til samskiftið verða keyptar frá uttanhýsis televeitara, og tekur *KTL* sær av at keypa inn, samráðast um prís fyri hesar linjur og samskiftir við televeitaran um uppseting. *Stovnurin* rindar fyri linjurnar. Gjald fyri høvuðssambandið til internetnýtslu er miðsavnað, og er partur av tænastugjaldinum.

Fjaratgongd frá teldum inn til Landsnet er sum meginregla einans gjørlig, antin við Direct Access (sjálvvirkandi VPN) ella terminalservara (RDS Gateway).

Netútgerðin (firewall og switchir), úti hjá *stovninum,* verður umsitin av *KTL*, men er ogn hjá *stovninum* og *stovnurin* rindar fyri útgerðina. Rætting av feilum og dagligur rakstur av netsambandinum og útgerðini er við í tænastugjaldinum. Nýggjar uppsetingar, broytingar og útskifting eru ikki við í tænastugjaldinum. Netútgerðin skal lúka krøv, sum *KTL* setir.

*KTL* bjóðar *stovninum* tráðleyst net. Útgerðin (atgongustøðini) til tráðleysa netið á *stovninum,* verður umsitin av *KTL*, men er ogn hjá *stovninum* og *stovnurin* rindar fyri útgerðina. Rætting av feilum og dagligur rakstur av tráðleysa netinum og tráðleysu útgerðini er við í tænastugjaldinum fyri tráðleysa netið. Tráðleysa netið er býtt í hesi net: Eitt arbeiðsnet til allar eindir, sum skulu hava fulla atgongd til allar tænastur á Landsneti, og eitt gestanet til vitjandi á *stovninum*, sum hava tørv á netsambandi eitt styttri tíðarskeið. Nýggjar uppsetingar, broytingar og útskifting eru ikki við í tænastugjaldinum.

Kaðalnetið inná *stovnin* skal góðkennast, áðrenn *stovnurin* verður innlimaður í Landsnet. Kaðalnetið á *stovninum* skal lúka eina sokallaða Cat5E støðulýsing, sum verður gjørd av góðkendum elinnleggjara. Støðulýsingin er ikki partur av tænastugjaldinum. Um illgruni er um feilir á kaðalnetinum inni á *stovninum*, kann *KTL* krevja, at *stovnurin* ger eina nýggja støðulýsing av kaðalnetinum.

*Stovnurin* hevur ábyrgd av at binda netútgerðina í kaðalnetið.

Netið er ikki sett upp til at koyra VoIP(Voice over IP) ella QoS (Quality of Service). Um *stovnurin* ynskir hetta, skal *stovnurin* boða *KTL* frá, sum so ger neyðugu broytingarnar fyri at gera VoIP og QoS virkið. VOIP og QOS uppsetingin er ikki partur av tænastugjaldinum.

*KTL* bjóðar sær til at yvirtaka umsitingina av DNS skrásetingunum hjá *stovninum*. Um *stovnurin* velur at umsita sínar DNS skrásetingar sjálvur, so er týdningarmikið, at broytingar, sum *KTL* boðar frá, fremjast beinanvegin. Tí tilskilar *KTL* sær rætt at umbiðja skrásetingar vegna *stovnin*.

## 2 Teldupost- og kalendaraskipan íroknað web-mail

*KTL* veitir *stovninum* eina teldupostskipan. Skipanin er Microsoft Exchange, sum saman við Outlook gevur fjølbroyttar møguleikar innan teldupost og kalendaraplanlegging.

Tað er týðandi, at skipanin er dagførd fyri at vera trygg og, at nýggir hentleikar eru tøkir, sum gera, at arbeiðið gongur skjótari. Tí stuðlar *KTL* ikki eldri útgávum av teldupostskipanini enn teirri næstnýggjastu. *Stovnurin* hevur ábyrgd av at dagføra sínar skipanir, soleiðis, at hesar arbeiða saman við teldupostskipanini hjá Landsneti.

Postbólkar: Til ber at fáa teldupostbólkar gjørdar eftir ynski.

Stødd fyri eitt einstakt teldubræv: Hámarkið fyri eitt einstakt teldubræv er 100MB.

Trygdaravrit (Backup): Dagligt trygdaravrit verður tikið av teldupostskipanini. Trygdaravrit verða goymd í eitt ár.

Endurskapan av trygdaravriti (Restore): Endurskapan verður gjørd eftir umbøn og er ikki partur av tænastugjaldinum. Endurskapan er tó við í tænastugjaldinum, um trupulleikar við skipanini eru orsøk til, at neyðugt er at endurskapa dátur.

Bronglan (kryptering): Teldubrøv eru ikki brongláð, og tískil mugu trúnaðarupplýsingar ikki sendast við teldubrævi, uttan at viðkomandi, sum sendir, sjálv/-ur fær dáturnar brongláðar. Teldupostskipanin stuðlar TLS[1] bronglan, og bronglar sjálvvirkandi samskiftið til móttakarar uttanfyri Landsnet, um móttakarin stuðlar tí. Fyri at kanna um móttakarin stuðlar bronglan, kann *stovnurin* seta seg í samband við *KTL*.

Fjaratgongd: Møguleiki er fyri atgongd til teldupostin umvegis internetið[2] og umvegis flestu sløgum av fartelefonum, men trygdina, í sambandi við nýtslu av hesum loysnum, hevur *stovnurin* fulla ábyrgd av. Standardurin er, at fjaratgongd er loyvd, um annað ikki er avtalað.

Viðlíkahald: Viðlíkahald og dagføringar av teldupostskipanini er við í tænstugjaldinum

Kalendaraskipan: Teldupostskipanin hevur innbygda kalendaraskipan. Kalendaraskipanin ger tað møguligt at síggja og umsita kalendarar hjá øðrum, um loyvið er givið til tað, senda fundarinnkallingar, felagskalendarar, bóking av felagshølum o.t.

Virus og spam: Øll teldubrøv til og frá internetinum verða kannaði fyri virus, spam og onnur óndsinnað forrit.

## 3 Skrivstovuforrit

Á vanligu teldunum, sum eru knýttar í Landsnet, verður Microsoft Office lagt inn sum skrivstovuforrit. *Stovnurin* hevur altíð rætt til nýggjastu útgávu av Microsoft Office, so skjótt sum *KTL* hevur góðkent hesa. *KTL* hevur rætt til at de-supportera eldri útgávur av Microsoft Office. *KTL* supporterar sum meginreglu bert tvær tær seinastu útgávurnar av Microsoft Office.

Fundarteldur, stempliteldur, tunnir klientar, fakteldur og teldur hjá løttum brúkarum fáa ikki Microsoft Office.

## 4 Atgongd til terminalservarar

Møguleiki er hjá *stovninum* brúka terminalservarar. Møguleiki er fyri at gera nýtslu av hesum, bæði á sjálvum *stovninum*, og tá brúkararnir arbeiða heimaníffrá.

[1] TLS, Transport Layer Security, verður nýtt til bronglan av teldupostsamskifti og er stuðlað av flestu teldupostskipanum.
[2] Webloysnin er ein OWA (Outlook Web App) loysn, sum liggur á https://post.landsnet.fo/owa

Deildur terminalservari:

- Deildir terminalservarar hava einans útvald standardforrit løgd inn. *KTL* avgerð, hvørja útgávu av stýrisskipan terminalservararnir hava, og hvørji forrit eru tøk.
- *Stovnurin* rindar eitt brúkaragjald fyri atgongdina.
- Dagføring av terminalservarunum og forritunum er við brúkaragjaldinum og verður gjørd eftir tørvi.

Egnan terminalservara:

- Fyri egnan terminalservara verður tikið mánaðargjald fyri servaran (galdandi fyri nýggjar terminalservarar eftir januar 2018) umframt brúkaragjald.
- *Stovnurin* avgerð hvørji forrit eru á servaranum. Fyri at svartíðirnar skulu vera góðar, skulu forritini vera egnað at koyra á terminalservara. *KTL* leggja standard- og møguliga serforrit inn. Serforritini verða løgd inn í samstarvi við *stovnin* ella veitaran av forritinum.
- Dagføring av terminalservaranum og standardforritum er við í servaragjaldinum og verður í gjørd í samstarvi við *stovnin*. Dagføring av serforritum er ábyrgd hjá *stovninum*.

Við einum skynsomum rakstri í huga bjóðar *KTL* bert tvær útgávur av stýrisskipanini.

# 5 Keyp og uppseting av teldum

Allar teldur, sum skulu brúkast á Landsneti, skulu knýtast í Active Directory hjá Landsneti.

*KTL* skal góðkenna slag av teldu og modell, áðrenn tær verða knýttar í Landsnet, og *KTL* noktar at teldur, ið ikki eru góðkendar, knýta seg í Landsnet. Teldur verða útvegaðar eftir lista, sum *KTL* umsitur, yvir góðkendar teldur, t.e. teldumerki (t.d. HP og Fujitsu) og model (t.d. Elitebook 840). Listin við góðkendum teldumerkjum finst á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni.

*KTL* útvegar og klárgerð teldur. *Stovnurin* rindar fyri útvegan av teldum, meðan klárgerðing av teldum er við í tænastugjaldinum fyri teldurnar. Er talan um fakskipanarteldur, t.d. teldur til ávís tól á rannsóknarstovu ella fundarteldur, fevnir klárgerðingin einans um at knýta teldurnar í Landsnet, tryggja at teldan fær dagføringar og leggja inn antivirus. Lisensir til Windows og Office eru ikki partur av tænastuni til fakskipanarteldur, fundarteldur o.tíl.

*KTL* leggur bert Windows stýrisskipanir inn á teldur og góðtekur tvær tær seinastu útgávurnar av Windows.

Tað ber eisini til at brúka Mac teldur við í minsta lagi næstnýggjastu útgávu av Mac OS X. Mac teldur verða innlimaðar á domenið og Office og antivirus veður lagt inn. *KTL* kann bert veita avmarkaða feilfinning og brúkarahjálp á Mac teldum, og vil tí í flestu førum vísa til veitarar við Mac førleikum, sum *stovnurin* sjálvur má rinda fyri.

*Stovnurin* hevur ábyrgd av at seta teldurnar til á staðnum.

Úrvalsbrúkarin hevur til uppgávu at leggja onnur brúkaraforrit inn á teldurnar hjá *stovninum*.

## 6 Uppseting og viðlíkahald av prent og prentservarum

*KTL* veitir prentservarar til Microsoft umhvørvið, sum gera tað møguligt at skriva út frá flest øllum vanligum Windows forritum. KTL leggur inn drivarar á prentservararnar og á teldurnar. Talan er um netprentarar og um prentaramerki (t.d. HP, Xerox, Oki, Canon), sum eru góðkend av *KTL*. Tað er krav, at tað eru Microsoft góðkendir drivarar tøkir. *KTL* kann nokta prentarum, um teir ikki lúka krøvini. *KTL* stuðlar bert Windows prentservarum, sum veitarin framvegis stuðlar.

Viðlíkahald: *KTL* røkir prentservarar og syrgir fyri dagføringum av Windows stýrisskipanini á teimum.

Atgeingi til prentarar: *KTL* syrgir fyri scriptum/politikkum, so brúkararnir fáa atgongd til prentararnar á sínum teldum. Tað er bert *stovnurin*, sum eigur prentaran, sum kann skriva út á honum, um ikki annað er avtalað.

Tøknilig uppseting: *KTL* leggur prentaradrivararnar á prentaraservararnar og teldurnar og ger neyðugu uppsetingina. *KTL* útvegar ip adressu til prentararnar. Í teimum førunum tað er neyðugt, ger *KTL* uppsetingina av prentaranum í samstarv við veitaran.

Uppseting á staðnum: *KTL* setur ikki prentaran til á staðnum. Tað er *stovnurin*, ið skal syrgja fyri at seta prentaran, har hann fysiskt skal standa. Er talan um multimaskinur, mælir *KTL stovninum* at fáa veitaran av multimaskinuni at seta hana til.

Dagføring av drivarum: *KTL* dagførir drivarar eftir tørvi.

Viðlíkahald av prentara: *KTL* viðlíkaheldur ikki prentarar (sjálvt tólið).

## 7 Dátugoymslupláss

Fíluservarar verða veittir av *KTL*. Veitingin umfatar egna mappu til brúkaran og felagsdrev til stovnin. *Stovnurin* geldur fyri dátunýtsluna.

Egin mappa: Er mappa, sum bert tann einstaki brúkarin sleppur framat, undantikið administratorar hjá *KTL*, sum í serligum førum, t.d. til feilfinning, kunnu ogna sær atgongd til hesar mappur.

Felagsdrev: *Stovnurin* fær sítt felagsdrev at goyma í.

Bólka-/verkætlanarmappur á felagsdrevinum: Gjørligt er at fáa mappur, sum bert brúkarar, ið eru knýttir til ein ávísan bólk ella eina ávísa verkætlan, skulu hava atgongd.

Atgongd: *KTL* stýrir atgongdini sambært ynskjum frá *stovninum*.

Logon script/politikkir: *KTL* syrgir fyri at deila mappurnar út til starvsfólkini.

Trygdaravritan (Backup): Dagligt trygdaravrit verður tikið av øllum dátum á fíluservarum. Trygdaravritið verður goymt í eitt ár.

Endurskapan av trygdaravriti (Restore): Endurskapan verður gjørt eftir umbøn og er ikki partur av tænastugjaldinum. Eru trupulleikar við skipanini orsøk til endurskapanina, rindar *stovnurin* ikki fyri arbeiðið.

Viðlíkahald: *KTL* røkir fíluservarar og syrgir fyri dagføringum av Windows stýrisskipan. *KTL* stuðlar bert Windows fíluservarum, sum veitarin framvegis stuðlar.

## 8 Skype for Business

Skype for Business er ein samskiftisskipan, sum er væl egna til samskifti og samarbeiði við starvsfelagar, aðrar stovnar og veitarar.

Skype for Business Standard er við í grundtænastuni og gevur hesar møguleikar

- Støða
- Kjatt við einstaklingar og bólkar
- Fíludeiling
- Ein-til-ein ljóð og myndauppkall

Skype for Business Enterprise krevur eitt eyka brúkaragjald og gevur hesar eyka møguleikar

- Ljóð og myndauppkall til bólkar
- Deila og vísa skerm við onnur
- Skype fundir

*KTL* avgerð nær Skype for Business verður dagført, og málið er í minsta lagi at nýta næstnýggjastu útgávu.

Kostnaðurin fyri at nýta Skype for Business Enterprise er eitt mánaðarligt brúkaragjald, sí heimasíðuna hjá Gjaldstovuni.

## 9 SharePoint

Stovnar í Landsneti hava atgongd til SharePoint. SharePoint er pallur, sum m.a. egnar seg væl til intranet og skjalagoymslu. SharePoint er eisini tøkt á internetinum, so lætt er at fáa atgongd til skjøl og intranet.

Við í tænastuni er grundleggjandi uppseting, rakstur og uppstigan av SharePoint pallinum, men ikki flyting av dáta. *KTL* avgerð nær SharePoint verður dagført, og málið er í minsta lagi at nýta næstnýggjastu útgávu.

SharePoint Standard lisensur er við í tænstuni.

Hevur stovnurin tørv á hentleikum, sum krevja SharePoint Enterprise lisens, er neyðugt, at stovnurin keypir hesar. Kostnaðurin fyri at nýta SharePoint er eitt mánaðarligt brúkaragjald, sí heimasíðuna hjá Gjaldstovuni.

## 10 Lisensir til forrit til undirstøðukervið – stýrikervi og skrivstovuforrit

Týdningarmikið er, at tað er gott skil á lisensunum – bæði so, at *KTL* hevur teir røttu lisensirnar og, at talið av lisensum er so rætt sum gjørligt.

Áðrenn *stovnurin* verður partur av Landsneti, verður kannað, um *stovnurin* hevur røttu lisensirnar - rætt tal og galdandi Software Assurance (SA). Vísir kanningin at *stovnurin* manglar lisensir, ella at SA ikki er galdandi, so rindar *stovnurin* fyri tað, ið manglar. Tað sokallaða SA gjaldið – sum er eitt tryggingargjald, ið tryggjar *stovninum* ta nýggjastu útgávuna av forritinum – verður goldið sum partur av tænastugjaldinum.

Hevur *stovnurin* ikki lisensir við SA, tá *stovnurin* verður partur av Landsneti, ber til ístaðin at velja leigu lisensir. Hetta ger tað ikki er neyðugt at gera íløgur í lisensir[3].

Fylgiskjal IV tilskilar talið av lisensum *stovnurin* hevur, tá hann verður partur av Landsneti. Setir *stovnurin* fleiri fólk í starv ella fær fleiri teldur enn tað, sum er tilskilað í Fylgiskjali IV, skal *stovnurin* gjalda fyri eyka lisensirnar.

*KTL* hevur ábyrgdina av lisensumsitingini til raksturin á Landsneti. Tað merkir, at tað er *KTL*, sum syrgir fyri, at eitt nøktandi og neyðugt tal av lisensum er tøkt, tá tørvur er á tí.

Einaferð um árið ger *KTL* eina lisensfrágreiðing fyri at tryggja, at samsvar er millum tal og slag av lisensum og veruliga nýtsluna. Frágreiðingin verður gjørd av óheftum ráðgeva.

*KTL* kann eisini standa fyri at keypa lisensir til Microsoft fakskipanir. Hetta er ikki partur av grundtænastunum, men er eyka tænasta, og skal tískil gjaldast serskilt av *stovninum*, sum biður um hesa tænastu.

# 11 KT skivan

## 11.1 Taka ímóti og skráseta (í helpdesk skipan) uppgávur frá *stovninum*

Tá *stovnurin* hevur uppgávur, sum hann vil hava KT Skivuna at loysa, skulu úrvalsbrúkarar sum meginregla sjálvir skráseta uppgávuna í helpdesk skipanini hjá *KTL*. Harumframt er eisini møguleiki, at ringja ella senda teldubræv til KT skivuna.

Úrvalsbrúkarin skal taka hædd fyri raðfestingini av uppgávuni í mun til val av miðli, sum verður brúktur at boða frá uppgávum til KT skivuna.

| Raðfesting | Frágreiðing |
|---|---|
| (1) Høg | Allir brúkarar á *stovninum* eru forðaðir atgongd til kritiskar Landsnettænastur. T.e. at KT Undirstøðukervið ikki er tøkt fyri hesar brúkarar, ella at funkur, sum eru kritiskar fyri virksemið á *stovninum*, ikki eru tøkar og harvið ávirkar framleiðsluna munandi i kritiskum støðum, t.d. í.s.v. serligar freistir so sum fíggjarlógararbeiði.<br><br>Farið verður beinanvegin í gongd (sí 'Tíðarskeið og atgeingi' niðanfyri) við at loysa trupulleikan, og arbeitt verður uttan íhald, inntil uppgávan er loyst. Trupulleikin eigur, at verða loystur innan ein tíma í vanligari arbeiðstíð. |
| (2) Miðal | Ein stórur bólkur av brúkarum hjá *stovninum* hava ikki atgongd til partar av Landsnet-tænastunum, t.e. at KT skipanirnar ikki eru tøkar fyri ávísar brúkarar/bólkar av brúkarum. |

[3] Av tí at leigu lisensir eru dýrari hækkar tænastugjaldið samsvarandi.

| | |
|---|---|
| | Farið verður beinanvegin í gongd (sí 'Tíðarskeið og atgeingi' niðanfyri) við at loysa trupulleikan. Trupulleikin eigur at verða loystur innan ein dag |
| (3) Normal | Ávísir brúkarar ella ein minni bólkur av brúkarum eru forðaðir atgongd til partar av Landsnettænastunum, t.e. at KT skipanirnar ikki eru tøkar fyri hesar brúkarar, ella lítil feilur/trupulleiki, sum ikki forðar skipanarrakstrinum, t.d. vantandi skjalfesting, eitt lítið broytingarynski ella ein prentarafeilur.<br><br>Farið verður skjótast gjørligt í gongd við at loysa trupulleikan. Miðað verður eftir, at trupulleikin verður loystur innan 5 yrkadagar. |
| (4) Lág | Smærri feilir/trupulleikar, sum einans ávirka einstakar brúkarar. Farið verður skjótast gjørligt í gongd við at loysa trupulleikan. Trupulleikin eigur at vera loystur innan ein mánað (30 dagar). |
| (5) Uttan SLA | Uppgávur, sum ikki eru at rokna sum ein beinleiðis partur av dagliga rakstrinum, men eru meir líkar verkætlanum. Flytingar, bygnaðarbroytingar, samanleggingar o.t. |

### 11.2 Support uppgávur raðfestar 'høgt'

Eru trupulleikar við tænastunum á Landsneti, sum ávirka allan *stovnin* og gera, at starvsfólkini verða illa darvað ella als ikki fáa arbeitt – skal hetta, uttan drál, fráboðast umvegis telefon, so vissa fæst fyri, at boðini eru móttikin.

### 11.3 Support uppgávur raðfestar 'miðal', "vanligt" ella 'lágt'

Her er talan um uppgávur, sum eru ætlaðar (t.d. stovna nýtt starvsfólk), ella um minni týðandi feilir. Í hesum førum, skal úrvalsbrúkarin skráseta uppgávuna í helpdesk skipanina. Sum undantak ber eisini til, at senda uppgávuna inn við teldubrævi (t.d. um úrvalsbrúkarin ikki er til staðar, og onkur, sum ikki hevur førleika ella rættindi at skráseta í helpdesk skipanina, boðar frá uppgávuni)

### 11.4 Stovna, broyta og strika brúkarar

*KTL* hevur ábyrgdina av brúkaraumsitingini, sum verður framd eftir ynski frá *stovninum*.

## 12 Tíðarskeið og atgeingi

### 12.1 Ætlað viðlíkahald

Talan er um sokallaði 'tænastuvindeygu'. Avtalað eru tvey tænastuvindeygu um vikuna. Tænastuvindeyguni liggja soleiðis:

| Vika | Longd av tænastuvindeyga | Tíðarbil har tað er møguligt at gera viðlíkahald |
|---|---|---|
| 1 | 2 tímar | Týskvøld og fríggjakvøld frá kl. 17:30-19:30 |
| 2 | 2 tímar | Týskvøld og fríggjakvøld frá kl. 22:30-00:30 |
| 3 | 2 tímar | Týskvøld og fríggjakvøld frá kl. 17:30-19:30 |

| | | |
|---|---|---|
| 4 | 5 tímar | Náttina til mikudag frá kl. 00:00-05:00 |
| 5 | 2 tímar | Týskvøld og fríggjakvøld frá kl. 22:30-00:30 |

Legg til merkis, at talan er um møgulig tænastuvindeygu, har partar av tænastunum ikki eru tøkar. *Stovnurin* verður kunnaður um, hvørjar tænastur eru ávirkaðar við telduposti til úrvalsbrúkararnar.

Tænastuvindeygu telja ikki við í uppitíðarkrøvunum.

## 12.2 Bráðfeingis viðlíkahald

Neyðugt kann eisini vera við bráðfeingis tænastuvindeygum, í førum, tá trupulleikar eru við rakstrinum, sum mugu rættast alt fyri eitt, ella ikki kunnu bíða til næsta tænastuvindeygað er. *Stovnurin* verður kunnaður um hvørjar tænastur eru ávirkaðar við telduposti til úrvalsbrúkararnar.

Bráðfeingis tænastuvindeygu telja ikki við í uppitíðarkrøvunum.

# 13 Trygd

## 13.1 Trygdarstig og skoðan

*KTL* hevur eitt trygdarstig, sum hóskar til váðar og týdning av virkseminum hjá *KTL*, og sum yvirheldur lógarkrøv og gjørdar avtalur. KT trygdin er grundað á ISO/IEC 27001 og íverksett eftir ISO/IEC 27002.

Einaferð um árið verður gjørd ein grannskoðan av 'generellum kontrollum' og undirskrivað av einum løggildum grannskoðara. Henda grannskoðan er grundað á galdandi grannskoðarastandard.

Grannskoðanin er partur av tænastugjaldinum.

Grannskoðaraváttanin verður send *stovninum* eftir umbøn.

Eftir áheitan frá *stovninum* ella *KTL* kann harumframt óheft trygdarskoðan verða framd av serstøkum økjum. Hetta skal tó altíð vera eftir avtalu við KT trygdarleiðaran hjá *KTL*. Slík trygdarskoðan kann verða framd av einum av *stovninum* valdum KT grannskoðara. *Stovnurin* rindar fyri hesa skoðan.

## 13.2 Trygdaramboð

*KTL* hevur KT trygdarskipanir, sum fyribyrgja, at óviðkomandi fáa atgongd, ella at óndsinnað forrit koma inn á Landsnet umvegis internetsambandið.

## 13.3 Fysiskir karmar

Hølini og bygningarnir, sum servararnir eru staðsettir í, fylgir forskriftum í ISO/IEC 27002.

## 13.4 Fráboðan um trygdarhendingar og –brot

Um KTL er vitandi um trygdarbrot ella -hendingar á *stovninum*, verður hetta fráboðað leiðsluni á *stovninum*. Um *stovnurin* er varugur við trygdarbrot ella -hendingar, skal hetta fráboðast *KTL* uttan drál við at ringja til KTL á 352490 ella við teldubrævi til ktskivan@gjaldstovan.fo viðmerkt í evninum *trygdarbrot* og/ella *trygdarhending*.

## 13.5 Ráðgeving

Í samband við KT trygdarspurningar kann KT trygdarfunkan hjá *KTL* veita *stovninum* ráðgeving.

## 13.6 Loggar

Allar royndir at innrita og øll internetnýtsla verður loggað.

Hevur *stovnurin* tørv á, at loggar verða gjørdir av øðrum virksemi/annað verður loggað, kann *KTL* seta hetta upp í samráð við *stovnin*, í tann mun tað letur seg gera. Hetta er ikki við í tænastugjaldinum.

## 13.7 Atgongd hjá veitara hjá *stovninum* til Landsnet

Umsókn um loyvi hjá veitara hjá *stovninum* at gera arbeiði á fakskipanum, sum liggja á Landsneti, finst sum oyðublað á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni.

## 13.8 Trygdaravrit

*KTL* tekur dagligt trygdaravrit av fílu- og teldupostservarunum. T.e. at *KTL* altíð hevur trygdaravrit av øllum dátum á fílu- og teldupostservarunum tøkt.

Standard trygdaravrit

- hvønn dag, ið kann endurskapað 30 dagar aftur
- + viku trygdaravrit í 5 vikur
- + mánaðir trygdaravrit í 12 mánaðir

SharePoint trygdaravrit

- hvønn dag, ið kann endurskapað 33 dagar aftur

## 13.9 Ábyrgdarpersónar

Samskifti av formligum slagi við *stovnin* verður myndað av stjóranum á *stovninum*, ella ein av honum útvaldum persóni. Talan kann verða um góðkenning av uppteljing av teldum á *stovninum*, um prinsipiellar hendingar (t.d. trygdarhendingar) og árliga viðgerð av støðuni millum *stovnin* og *KTL*. Ítøkiligt dømi er, at ábyrgdarpersónurin mánaðarliga skal tryggja, at skrásettir brúkarar hjá *stovninum* eru rættir. M.a. fyri at tryggja at starvsfólk, sum eru farin úr starvi, ikki framvegis eru skrásett í Landsneti.

## 13.10 Úrvalsbrúkarar

Uppgávurnar hjá úrvalsbrúkarunum eru:

- Feilrætting í skrivstovuforritum.
- Leggja inn serforrit.
- Hjálpa til at seta upp skíggjar, mýs og tastatur.
- Seta netprentarar til á teldunum.
- Greina og tulka feilir og evt. rætta teir, um tað ber til.
- Skráseta feilir/trupulleikar í helpdesk skipanini hjá KT Skivuni.
- Samskifta við KT Skivuna um uppgávur og fylgja upp.
- Kunna KT Skivuna um stovning, broyting og striking av brúkarum.
- Kunna brúkarar um loysnir og trupulleikar.